# Marjun Lómaklett innsett sum prestur



*Bjarni Bæk, dómpróstur, innsetti Marjun Lómaklett*

**Sunnudagin varð Marjun Lómaklett innsett sum prestur í Dómkirkjuni**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Sunnudagin var hátíðardámur í Havnar kirkju, tá Bjarni Bæk, dómpróstur, innsetti Marjuna Lómaklett úr Klaksvík sum prest í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi.

Marjun Lómaklett hevur áður verið prestur í danska býnum Sæby í nøkur ár, og har fer hon at halda fráfaringarguðstænastu næsta sunnudag.

Fýra umsóknir komu inn til prestastarvið í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi, og Marjun Lómaklett varð innstillað sum nummar eitt.

Umframt Marjun Lómaklett og Bjarna Bæk, vóru Hans Jacob Joensen, bispur, og Sonja Klein, prestur, eisini til staðar undir guðstænastuni.

## Prædika eftir Marjuna Lómaklett. Hildin í Havnar kirkju sunnudagin

3. s. e. trettanda

Dagsins tekstur sigur frá tveimum lekingum, ið samstundis beinleiðis og óbeinleiðis eru tvær trúarfrásagnir.

Eydsæð er, at trúarálitið er tengt at Jesusi. Bæði hin spidalski og herhøvdingin fara til Jesusar og ikki til onkran annan. Hin spidalski hevur uttan iva havt síni ivamál, áðrenn hann nærkaðist Jesusi, tí hann visti jú, at hann ikki mátti koma nærhendis frískum menniskjum. Og herhøvdingin hevur eisini skulað tikið mót til sín; tí sum heiðin herhøvdingi var tað ikki sum at siga tað at leita sær til Jesusar. Sostatt sýndi heryvirmaðurin stórt dirvi og vann á mannaóttanum.

Felags fyri báðar er, at teir koma fyri at biðja um hjálp, hóast teir kenna seg óverdigar í mun til Jesus. Teir koma, tí teir vóru í neyð, og tí teir trúðu, at Jesus kundi hjálpa teimum. Teir vóru sterkt sannførdir um, at Jesus kundi hjálpa teimum, og teir vórðu ikki vónsviknir.

Spidalskleiki ella líktrá er navnið á eini ræðuligari sjúku. Hon er ikki pínufull, men er fyrst og fremst vandamikil, tí evnið til at kenna pínu hvørvur. Tað er ein sjúka, har ið ein upplivir forfall, upploysing og oyðilegging. Tað er forfall likamsins, men tað er eisini upploysing og oyðilegging av tí menniskjaliga felagsskapinum.

Tað merkir, at hin spidalski mátti fara frá bygd og familju síni til tess at liva saman við øðrum spidølskum. – Tann spidalski var trúarliga óreinur. Varð tí útstoyttur úr templinum, og harvið eisini hildin frá gudstænastuni. Tí eitur tað um hin spidalska, at ikki bert varð hann lektur fyri sjúkuna, men hann vard eisini reinsaður. Og tí er tað, at presturin skal kanna hann og boða hann reinsadan, so hann aftur hevur atgongd til templið og harvið kunna luttaka í gudstænastuni.

Á tann hátt kann tala Bíbliunnar um spidalskleika minna okkum á sjúkdómin hjá allari tí fallnu mannaættini, - nevniliga syndina – júst tað, at vit vilja nakað annað enn tað, ið er vilji Guds. At vit søkja okkum sjálv og okkara egna, og harvið eins og líktráin útiloka okkum sjálv – beint tvørturímóti vilja Guds – frá hansara nærveru.

Men Jesus kom sum okkara stóri lækni. Hann kom fyri at lekja okkum, bæði uttan og innan. Jesus kann ikki einans lekja likamliga, men hann kann eisini taka burtur syndina, sum skilti okkum frá Gudi og øðrum menniskjum. - Jesus kom fyri at geva okkum fyrigeving Guds. Hann bar syndir várar og leið í deyðan fyri okkum.

Hin spidalski var útilokaður frá gudstænastuni og menniskjum. Og soleiðis var tað eisini á ein hátt hjá tí rómverskja heryvirmanninum, hvørs drongur var sjúkur. Tí í eygum jødanna var ein rómverskur herhøvdingi eisini ein, ið tú skuldi halda teg frá. Tí fyri tað fyrsta var hann heidningur, tvs. ikki jødi, og tí útihýstur frá kærleika og vælsignilsi Guds. Harafturat var hann eitt umboð fyri tað fíggindaliga hersetingarvaldið. Hóast hetta tordi herhøvdingin at leita sær til Jesusar, tí hann ikki visti, hvat hann annars skuldi gera. Hann var vísur í, at Jesus bæði vildi og kundi lekja mannin, - eisini um hann var frástaddur!

Jesus hevði stóra virðing fyri áliti herhøvdingans til hansara guddómmligu megi og mátt. Samstundis undraðist hann yvir, at ein maður, ið ikki hoyrdi til Guds útvalda fólk, hevði so stóra trúgv!

Herhøvdingin hevði nógv størri álit á Gud enn flestu jødar, og tí hevði hann, hóast hann ikki var jødi, eitt pláss í ríki Guds. Ja, í kraft av síni megnar trúgv á Jesus, kemur hann at sita til borðs vid teimum trimum patriarkunum í Ísrael, Abrahami, Ísaki og Jákupi. Meðan Guds egna fólk varpaði seg sjálvan út í myrkrið fyri uttan vegna vantrúgv sína.

Her vórðu tingini veruliga sett á høvdið. Tí mong av teimum, id trúðu, at tey vóru sjálvskrivað til eitt pláss við veitsluborðið í Himlinum, tey máttu sanna, at tey vórðu sett uttan fyri í sortan. Ímeðan tey, ið